## Connie kanska kommiserur



Sum er hevur ES ongan kommiser í veðurlagsviðurskiftum, men danskir fjølmiðlar nevna nú, at kanska verður danski veðurlagsráðharrin, Connie Hedegaard, tann fyrsti, sum fær tað starvið, tá tað verður skipað. Floksfelagi hennara, Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, sigur við DR, at Connie hevði verið eitt gott boð, um ES ger av at seta ein kommiser í veðurlagsmálum. Connie Hedegaard er í Konservativa flokkinum, men Vinstri sigst eisini hava síni boð í Ullu Tørnæs, menningarmálaráðharra og Evu Kjær Hansen, matvørumálaráðharra, sigur DR.

## Dómarar fordøma Berlusconi

Í Italia er dómarafelagið í øðini inn á Silvio Berlusconi, forsætisráðharra, sum sambært dómarunum er í ferð við at undirgrava álitið á ákæruvaldið og dómsvaldið. Tað var mánadagin, at Berlusconi segði, at tað var óneyðugt arbeiði og pengaspilla, at ákæruvaldið kannar fleiri dráp, sum mafian framdi tíðliga í nítiárunum. Forsætisráðharrin fór so langt sum at leggja kanningardómararnar undir at arbeiða ímóti tí politiska myndugleikanum. Tað vilja dómararnir ikki hava sitandi á sær, og tí hevur felag teirra sent stjórnini eitt hvassorðað mótmæli, skrivar AFP úr Milano.

# Ongin peningur eftir til fiskimenn

**Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum er komin í klemmu ímillum tvær lógir**

INNTØKUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hóast fiskimenn og útróðrarmenn hava so lítla inntøku, at teir hava rætt til minstuløn, dagstudning, ella mánaðarligan minstaforvinning, skulu teir ikki vænta at fáa eitt oyra - fyribils í øllum førum.

Øll útgjøld til inntøkutrygd eru nevniliga steðgað.

Orsøkin til tað er, at játtanin, sum er samtykt á fíggjarlógini í ár til inntøkutrygd, er uppi.

Og tá ið ongin peningur er til taks, hevur Jacob Vestergaard, landssýrismaður í fiskivinnumálum, rætt og slætt gjørt av at stegða øllum útgjøldum.

Hetta fortaldi hann fyri Løgtinginum í gjár.

Tað var Bjørn Kalsø, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, sum spurdi Jacob Vestergaard um tað ber til at steðga einum útgjaldi, sum ein borgari hevur lógarfest krav upp.

Landsstýrismaðurin váttaði, at játtanin á fíggjarlógini til inntøkutrygdina, er uppi.

Sostatt eru higartil í ár brúktar 24 milliónir til inntøkutrygd til fiskimenn og útróðrarmenn.

Hann segði eisini, at tað eru 14 dagar síðani, at játtanin var uppi og síðani tá er onki útgoldið.

### Vónar tað besta

Annars var ætlanin, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skuldi leggja leggja uppskot fyri Løgtingið í hesi vikuni um at fáa eykajáttan til ymisk endamál.

Og Jacob Vestergaard staðfesti, at í hesum sambandi at hann hevur biðið um meiri pening til inntøkutrygdina.

Men onki uppskot varð lagt fyri tingið og sambært Kringvarpinum fyrr í vikuni, var orsøkin tann, at samgongan var ósamd um - onki minni enn inntøkutrygdina.

- Vit vóna at Løgtingið játtar peningin so at inntøkutrygdin kann halda fram, segði Jacob Vestergaard.

Hann helt, at tað var ein løgin støða at koma í at skula taka avgerð um ein lógarkravd útreiðsla skal halda fram, hóast játtanin er uppi.

Men hann vísti á, at hann var komin í klemmu í millum tvær lógir. Øðrumegin var tað lógin, sum gav fiski- og útróðrarmonnum rætt til inntøkutrygd og hinumegin var tað fíggjarlógin, sum Løgtingið hevur samtykt.

- Fyribils hava vit so gjørt av at bíða við at galda meiri út í inntøkutrygd til vit vónandi fáa játtan frá løgtinginum, segði hann.

### Órímiligt

Løgtingsmenn hildu, at tað var órímiligt, at ein landsstýrismaður kundi koma í eina støðu, at heldur hann eina lóg, má hann bróta eina aðra. Tað vóru eisini løgtingsmenn sum spurdu um orsøkin til at hann hevði steðgað øllum útgjøldum var, at hann stúrdi fyri at verða uppsagdur fyri at hava brúkt meiri enn hann hevði fingið játtað.

Tinglimir vóru eisini ørkymlaður av, at Jacob Vestergaard ikki var meiri kontantur enn at kundi "vóna" at peningurin fer at verða játtaðir.

Tað varð eisini fýlst á, at samgongan skapti slíkan ótryggleika á økinum.

Víst varð eisini á, at tað eru fiskimenn, sum sita við púra ongum í hesum døgum, tí teir fáa ikki minstuløn, hóast teir hava rætt til tað.

Jacob Vestergaard stóð eisini fyri skotum frá samgongufeløgunum, sum førdi fram, at tað var longu tíðliga í ár, at tað gjørdust greitt, at peningur fór at mangla í og tí átti hann at havt biðið um eykajáttan fyrr.

Tá ið landsstýrismaðurin tók saman um, segði hann, at ongin ivi er um, at inntøkutrygdin verður útgoldin, hann fekk bara sagt akkurát nær.



*Fiskimenn og ítróðrarmenn fáa ikki minstuløn ella aðra inntøkutrygd, hóast teir hava rætt til tað, tí peningurin er uppi. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum er komin í ta merkiligu støðu, at heldur hann eina lóg, má hann bróta eina aðra og tí hevur hann steðga øllum útgjaldi*

# Broyta ikki lógina um pensjónistar og heilivág

**Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, ger púra greitt, at lógin, sum strikar stuðulin til heilivág til pensjónistar, verður ikki broytt aftur**

PENSJÓNISTAR OG HEILIVÁGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Illa umstrídda lógin, sum hevur avtikið stuðulin til ávísan heilivág til pensjónistar, verður ikki broytt, so at farið verður aftur til gomlu skipanina.

Tað staðfestir Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum í Løgtinginum í gjár.

Lógin, sum strikar stuðulin til ávísan heilivág hevur fingið nógva umrøðu, tí hon hevur ført við sær, at hjá summum pensónistum er heilivágur nú blivin so dýrur, at teir hava ikki ráð at loysa hann út og eru tískil farnir tómhentir aftur av apotekinum.

Tórbjørn Jacobsen spurdi hana um nøkur ætlan var at strika nýggju lógina, so at farið verður aftur til gomlu skipanina, so at veikastu bólkarnir aftur kunnu fáa tann heilivág. Læknar teirra meta vera neyðugan.

Aðrir tinglimir í samgonguni spurdu um landsstýriskvinnan er sinnað at rætta lógina, skuldi tað víst seg, at avleiðingarnar av uppskotinum um at strika stuðulin til heilivág farnar út um tað, sum má metast at vera sosialpolitiskt forsvarligt.

Svarið frá landsstýriskvinnuni var klárt og greitt: Nei, lógin verður ikki broytt.

Men hon legði afturat, at orsøkin til at lógin ikki verður broytt, er tann, at arbeitt verður við eini sjúkratryggingarlóg og har undir kemur eisini alt, sum eitur heilivágur og serviðgerðir.

Í hesum sambandi verður serliga hugt eftir fólki, sum hava serliga trong kor og sum ikki hava ráð til at betala sín heilivág sjálvi og samstundis verður hugt eftir støðuni hjá fólki við varandi sjúku.

Eftir ætlan verður tann lógin løgd fram fyrsta november.

Hon staðfestir, at eitt uppskot frá Miðflokkinum er til viðgerðar í trivnaðarnevndini og tá verður eisini støða tikin til spurningin, skuldi tað víst seg, at átrokandi broytingar eru neyðugar.

Nógvir tinglimir høvdu ikki álit á, at uppskotið um nýggja tryggingarlóg verður løgd fyri tingið so skjótt, sum Rósa Samuelsen hevur boðað frá tí royndir vísti, at ofta gongur nógv longri enn ætlað í politikki.

Av tí sama var átalað, at onki skal gerast, fyrrenn ætlaða sjúkratryggingin verður sett í verk.